gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Tillukku

Oftani verða vit føroyingar ikki minst av okkum sjálvum skýrdir sum eitt fólk, sum stendur spjatt og sum ikki kann semjast ella standa saman um nakað sum helst. Møguliga er hetta nakað, sum eyðkennir eitt oyggjafólk, ið liggur fjarskotið frá meginlandinum. Men neyvan stendur so nógv verri til her enn aðrastaðni. Munurin er bert tann, at vit eru so fá, og tí merkist sínamillum ósemja og stríð so væl. Tað gerst so sjónligt.

Eitt er tó, sum allir føroyingar standa saman og fylkjast um. Tað er tá okkara ítróttafólk royna seg millum stórlandalið av ymsum slag. Og hetta kemur einamest til sjóndar, tá sjálvt tjóðítróttarlið okkara, um ein kann loyva sær at siga so, fótbóltslandsliðið, dystast í altjóða kappingum.

Tað hevur verið sagt av so mongum, ikki minst av útlendingum, at føroyska fótbóltslandsliðið er besti ambassadørur Føroya og føroyinga. Fá eru tey í útheimi, sum hava hoyrt um ella vita nakað um Føroyar. Men nevnir tú fótbóltslandsliðið, so rakna tey við og brosa. Jú nú vita tey bráddliga, hvar Føroyar eru. Tað er tann evarska lítla tjóðin, sum hevur bjóðað alheims risaveldum av í fótbólti og sum hevur kunnað víst á góð úrslit. Aftur og aftur hoyra vit um sigurin á sinni móti Eysturríki. Tað var so tað. Vit mugu koma víðari, og tað koma vit eisini. Úrslitini hjá fótbóltslandsliðnum móti Luksemburg og Ruslandi prógva, at vit hava fingið eitt landslið, ið kann liva upp til at spæla við í so stórum altjóða kappingum sum bæði HM og EM.

Hóast nógv skerdir, nú fleiri av okkara frægu leikarum vórðu sjúkir ella skæddir, megnaði restin av hópinum at vinna á Luksemburg og bert tapa við einum máli móti Ruslandi. Tillukku við hesum frálíku úrslitum. Tað er einki minni enn eitt bragd bert at tapa við einum máli móti Ruslandi á teirra heimavølli og við einum nógv skerdum liði. Hetta boðar frá góðum í komandi kappingum.

Vit kunnu bara geva landsliðnum og ikki minst teimum, sum stíla fyri, okkara besta skoðsmál og stuðul. Tit eru tann mest savnandi eindin í føroyska samfelagnum. Tit fáa okkum at gloyma gerandisdagin eina løtu, nakað vit øll hava brúk fyri viðhvørt. Tit fáa okkum at kenna okkum errin av at vera føroyingar. Nakað, sum vit øll eisini hava brúk fyri við hvørt.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Óli Breckmann 53



Í dag verður Óli Breckmann, løgtings- og fólkatingsmaður 53 ár. Óli er sonur Astrið og Ludvig Breckmann í Havn. Hann er giftur Birnu, dóttir Monu og Petur Midjord á Argjum.

Óli Breckmann er útbúgvin Master of Art í enskum máli á University of Edinburgh. BSc í samfelags- og búskaparsøgu frá Bristol University. Hann hevur starvast sum adjunktur við Føroya Studentaskúla 1974-84, blaðstjóri á Dagblaðnum 1975-91 og frá 1998.

Óli varð sum 26 ára gamal valdur á ting fyri Fólkaflokkin í 1974, og hann gjørdi seg kendan við sínum serliga máta at bera seg fram uppá. Dagblaðið og Óli Breckmann gjørdust nær um eitt, har hann profileraði seg sum Stavnamannin.

Ein umstríddur og markantur politikari, kann man siga, at Óli Breckmann hevur verið, bæði í føroyskum og donskum politikki. Rættuliga víðgongdur í sínum sjónarmiðum, men seinnu árini hava fólk ikki tikið tað so nógv í álvara, hava líkasum vant seg við, at tað mest er oman fyri hálsvølin, at hann er so víðgongdur.

Í 1984 vann Fólkaflokkurin aftur fólkatingssessin fyri fyrstu ferð í nógv ár. Valkvøldið hendan januardagin var eingin, sum ivaðist í, at tað var formaður floksins, Jógvan Sundstein, sum nú skuldi umboða flokkin á fólkatingi. Óli Breckmann, sum umboðaði flokkin í útvarpinum, ynksti eisini Jógvani tillukku við fólkatingssessinum. Men stutt eftir gjørdist greitt, at tað var ikki Jógvan Sundstein, men Óli Breckmann, sum varð valdur í fólkatingið. Hann fekk 11 atkvøður fleiri enn Jógvan Sundstein.

Síðani tá hevur ongantíð valdað ivi um, hvør er fólkatingskandidaturin hjá Fólkaflokkinum.

### Finnur Helmsdal í býráðið

Av tí at Jógvan Arge er



burturi í arbeiðsørindum, hevur hann boðað Tórshavnar býráð frá, at varamaður skal møta fyri hann í býráðnum. Og varamaður hansara, er Finnur Helmsdal, sum eisini er varamaður fyri Høgna Hoydal á tingi.

Finnur er 48 ára gamal. Hann er sonur Oliviu og Mikkjal Helmsdal, fyrrverandi landsverkfrøðing. Hann er giftur Jórun Højgaard dóttir Olgu og Samson Højgaard. Hann er útbúgvin sosialráðgevi og starvaðist árini 1981-85 sum sosialráðgevi á Almannastovuni. Árini 1985-1994 var hann leiðari á Andveikraverndini og frá 1994 til 1. august 1998 á Almannstovuni.

Finnur Helmsdal var eisini kendur sum ítróttarmaður, bæði sum fótbóltsleikari hjá HB og sum hondbóltsleikari hjá Kyndli. Hann hevur eisini skrivað bøkur um ítrótt og starvast sum ítróttarblaðmaður hjá Oyggjatíðindum.

# Alkometrini sera neyv

FERÐSLA
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Tá ið løgreglan krevur útandingarroynd av bilførarum, verður nýtt eitt sokallað alkometur, sum neyvt mátar, hvussu nógv bilførarin hevur drukkið av alkoholi. Í flestu londum, eisini í grannalondum sum t.d. Svøríki, er henda kanning nóg mikið. Mátitólini verða av rættinum mett so neyv, at tílíkar kanningar halda í einum rættarmáli.

Her hjá okkum verður tó framvegis blóðroynd kravd, eftir at staðfest er við alkometri, at ein bilførari hevur drukkið. Serliga um ivamál eru um nøgdina og harvið sjálvt promillumarkið, verður mett tryggast við blóðroynd.

Men kanningarnar vísa, at alkometrini eru so neyv, at samsvar altíð er millum úrslitið av blóðroyndini og tað, sum alkometrið vísir. Harnæst er tað soleiðis, at verður blóðroyndin burtur, t.d. oyðiløgd ella stolin – sum er komið fyri, so metir rætturin alkometrini at vera so eftirfarandi, at alkometurkanningin verður løgd sum grundarlag undir møguligum dómi.

# Landskassin onga inntøku av kampingvognum

FERÐSLA
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Flestu tingmenn tykjast samdir um, at tað ikki er rætt, at føroyingar skulu hava kampingvognar skrásettar uttanlands, tí ov kostnaðarmikið er at skráseta teir í Føroyum.

Sambært lóg um skrásetingargjald á motorakførum er avgjaldið fyri kamp-ingvognar 45% av avgjaldsskylduga virðinum. Hetta hevur borið við sær, at landskassin ikki hevur fingið eina krónu í skrásetingargjaldi av kampingvognum í mong ár. Ein broyting kemur møguliga, tá ið fíggjarmálastýrið skjótt kemur við broytingum í skrásetingargjaldinum, og annars hava tríggir tingmenn skotið upp, at avgjaldið verður tikið av beinanvegin.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



